Nr. 97/2019

Uni Rasmussen
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur um heimleys, settur landsstýrismanninum í heilsumálum, Kaj Leo Holm Johannesen (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

1. Hvussu nógv heimleys liggja og hava ligið á teimum trimum sjúkrahúsunum seinastu trý árini?
2. Hvussu gomul eru tey heimleysu, ið liggja á sjúkrahúsunum kring landið?
3. Hvussu leingi liggja tey heimleysu í miðal á sjúkrahúsunum, áðrenn tey verða útskrivað?

Viðmerkingar:
Í samrøðu við Kringvarp Føroya 18. mai 2020 segði Sonja Nielsen, leiðari á B6 á Landssjúkrahúsinum, at tað kemur fyri, at fólk enda við at liggja á deildini í upp til 10 mánaðir. Talan er um fólk, sum av ymiskum orsøkum eru so mikið illa fyri, at tey hava ongastaðni at fara, tá viðgerðin er av. Tað tykist, sum eingin hevur ábyrgdina. Hvørki Heilsumálaráðið ella Almannamálaráðið. Av tí sama detta tey heimleysu niðurímillum í skipanini.
Sum vælferðarsamfelag hava vit til uppgávu at hjálpa teimum, ið koma illa fyri, og tí er tað umráðandi at finna út av, hvussu stórur og umfatandi trupulleikin er.
Tískil verður spurt um, hvussu nógv heimleys liggja á teimum trimum sjúkrahúsunum, hvussu gomul tey eru, og hvussu leingi tey liggja á sjúkrahúsunum í miðal, áðrenn tey verða útskrivað.

Á Løgtingi, 10. juni 2020

Uni Rasmussen